


Fýra føroyingar á básinum hjá Lundin í Stavanger. Fv. Nicholas Holm, kredittstjóri í Danske Bank, Teitur Poulsen, stjóri í Lundin, Tummas Pauli Mýri, deildarleiðari í Lundin og Ben arabo, stjóri í Atlantic Petroleum. Mynd Jan Muller

# Atlantic Petroleum keypir leitiloyvi í Norskahavinum

Deil:

**Jan Müller**

28.08.2014 - 18:23

Oljan.fo

Atlantic Petroleum hevur keypt 10% av tveimum leitiloyvum í Norskahavinum.

Tað snýr seg um tvey loyvi hjá Ithaca Petroleum. Handilin er partur í nýggju strategiini hjá felagnum í hesum økinum. Herfyri seldi felagið 6% í einum øðrum leitiloyvi til Repsol. Atlantic eigur framvegis 9% í tí loyvinum.

Í løtuni borar Atlantic Petroleum Pegasus brunnin. Seinni fer felagið at bora Ivory brunnin.